Fólkaflokkurin er ikki ein sosialistiskur flokkur

(Framhald frá 4. síðu)

Fólkabókasøvn

Framd er lóg um fólkabókasøvn hareftir føst skipan fyri studning til rakstur og bygging av bygdabókasavnum er gjørd soleiðis at landskassin nú ber helmingin av útreiðslunum til bókasavnini. Av hesum ávum eru fleiri nýggj bókasøvn sett á stovn.

Norðurlanda ráðið - uttanlanda umboðan

Ráðgevari í føroyskum spurningum er settur í uttanríkistænastuna — føroyskur umboðsmaður í handilsmálum er sett í Rom at røkja áhugamál okkara í Suðurlondum.

Føroyar hava fingið egnar umboðsmenn í Norðurlandaráðnum. Hóast henda umboðan ikki til fulnar svarar til krøv Javnaðarflokksins er her vunnið væl áleiðis.

Strandferðslan - vegasambandið


Í hesum valskeiði hevur dentur verið lagdur á at samskipa ferðsluna mest møguligt. Gjørdir eru nýggir vegir, tunnellir og stór vegastrekki eru asfalterað.

Framt er nýtt fergusamband millum Klakksvík-Leirvík, og ferðaskipið millum Sandoy-Tórshavn er farið í gerð.

Gjølligar lýsingar av hesum málum finnast í bóklingum, ið koma út í teimum ymsu valdømunum.

Telefonmálið

Stórur dentur hevur verið lagdur á at bøta um telefonsambandið um allar oyggjarnar. Serliga millumbygdasambandið



verður nú nýggjað og automatiseringin framd víða hvar, so møguleikar verða at ringja beinleiðis millum oyggjarnar og til útlandið.

Fólkaflokkurin er ikki ein sosialistiskur flokkur, men nú upp undir løgtingsvalið í heyst hevur hann fingið sær nøkur mál á tí sosiala økinum inn í stevnuskrá sína, sigur J. Vester gaard (valevni í Suðuroy) í Dagbladnum nr. 73 fyri 10. oktober í ár og síðan roknar hann upp øll tey góðu uppskotini sum flokkurin hevur lagt fram á hesum sama øki, men sum javnaðarmenn hava verið við til at felt.

Fyrst er at siga, at tað mesta av hesum sosialu málum á stevnuskránni hevur fólkaflokkurin tillátt sær at lána frá javnaðarmonnum, tí tað ræður sjálvandi um nú til løgtingsvalið at vera eldhugaður fyri sosialum málum, »»hensigten helliger midlet«, men hvussu eldhugaður ein politiskur flokk ur kann vera fyri slíkum málum tá hann í almennum blað avdúkar seg sjálvan við at skriva: »Fólkaflokkurin er ikki ein sosialistiskur flokkur«.

Tað var gott at tú segði tað J. V., tí størri tænastu kundi eingin rokna við fór at vera gjørd hini arbeiðandi fjøldini til komandi val enn at vísa sítt sanna andlit. Manst tú ikki hava gjørt flokkinum eina bjarnatænastu? tá er tað løgið.

Nú kann hin føroyski fiskimaðurin, hin føroyski arbeiðarin síggja og døma um hvat gott hann kann vænta sær aftaná eitt komandi løgtingsval.

Eg havi sagt tað fyrr og kann siga tað einaferð enn, at burðaleypurin við uppskotum frá fólkaflokkinum kann vera so á tremur hann vera vil, er einki uppskot í leypinum um, hvussu innmaturin skal gjaldast, er tað sum at blæsa við fullum munni av mjøli, og til tað meti eg teg J. V. ógóðan at vera.

Ein flokkur sum ikki er sosialistiskur kann aldrin í verðini hava áhuga fyr sosialum málum uttan líka til eitt løgtingsval.

Orðið »sosial« merkir, vinskap fyri øðrum menniskjum, merkir bróðrakenslur og føling við samfelagnum og harav skapa eitt fólkaheim, har øll fólk vera felags um eina roynd at vinna sum mest og fáa eina útroku av ágóðanum sum kann svara til tann innsats hvør arbeiðandi maður og kvinna avrikar í sínum dagliga yrki.

Hitt ikki at vera sosialistur, er individualisma og tað merkir eina egoistiska líkasælu um tað gongur øðrum menniskjum gott ella illa. »Vertin á hvat annar fær, eg skal nøra at mær«, sungu rovfuglar í Fugla kvæðnum.

Bera í føvningi fult av uppskotum inn á ting, ið kosta landinum fleiri miljónur krónur, uttan við einum orði at vísa á hvar peningurin skuldi takast frá, ber væl til tá løgtingsval stendur fyri durum. Hví vóru ikki nøkur av hesum málum framd undir »sjálvstýrislandsstýrinum«, vóru ongir langfarafiskimenn tá, ella vóru ongi børn tá heldur?

Hetta landsstýrið hevur veðhildið og givið studning fyri meir enn 100 miljónur krónur til endurnýgging av skipaflotanum fyri uttan nógv annað, so illa mátti borið til at komi og sagt, at púrt einki er gjørt.

Øll nútímans tiltøk og framstig, alt snildi og allir hentleikar, verða skipað við samvinnandi tænastu fyri menniskjuna, samfelagið — alt fólkið sum einstaklingin og heildina. Ávøksturn má sostatt ikki einans koma nøkrum fáum einstaklingum tilgóðar, men øllum forbrúkarum, allari teirri luttakandi arbeiðandi fjøldini (eisini langfarafiskimonnum og børnum) eins og teimum vegna sjúku, avlami og á annan hátt skerdu í samfelagnum. Ein útbyggjan av okkara vinnulívi á sjógvi og landi, at skapa arbeiði til øll, er aðaltakið og virkisskrá Føroya javnaðarflokks.

Tí kann ein við góðari samvitsku seta krossin hin 7. november við lista C ella eitt av valevnunum á listanum.

J. P. T.

Nátúrfriðing - forboð móti útflytan av tjóðarminnum

Framd er lóg um nátúrfriðingartiltøk fyri at verja náttúru okkara móti skemman. Somuleiðis er sett forboð fyri at útfluttir verða lutir, ið hava tjóðminnisvirði.

Húsalánsviðurskifti

Í hesum valskeiði eru settar kr. 3.000.000 aftrat í Húsalánsgrunnin sum beinleiðis studningur, umframt at grunnurin hevur tikið upp lán úr øðrum stovnum til útláns. Haraftrat er grunninum heimilað at útskrivað brævalán, soleiðis at grunnurin skjótt kann vera førur fyri at veita tey lán, sum tørvur er á.

Virkisoki Realkreditinstitutsins er samtykt at verða víðkað til eisini at umfata húsabygging. Hetta mál er nú til viðgerðar hjá ríkismyndugleikunum.

Íleggingargrunnurin

Eitt mál, sum Javnaðarflokkurin legði stóran dent á at fáa framt, var hin mikið umtalaði íleggingargrunnurin — »60 miljónagrunnurin«. Hetta mál sógu allir hinir flokkarnir vera tað bera og blekta valbluff hjá javnaðarmonnum.

Men ikki var valið meira enn av, fyrrenn pengarnir vóru tøkir.

Í hesum valskeiði hevur flokkurin verið iðin talsmaðurin fyri at økja henda týdningarmikla íleggir[illegible]runn uppaftur meira. Samráðingar um hetta mál góvu til [illegible] at grunnurin nú er øktur við kr. 54 miljónum til ialt 114 milj. kr.

Hvønn alstóran týdning hesin fíggingargrunnur hevur fyri samfelagið kennist av tí vøkstri og uppbyggjan sum fer fram í Føroyum í dag.

Fyrr vóru ...

(Framhald frá 2. síðu)

Tá ið vit eru farin at nevna, at um fá ár eru tey mest óhugsandi ting í dag, vorðin ein sjálvfylgja, so komi eg at hugsa um, ta ferðina (í 1958) tá eg var biðin at fara út í húsini við einum pappírslepa, har tað bert stóð eitt einasta orð:

FÓLKAPENSIÓN

Tað eru 12 ár liðin síðan — tá spurdu summi uppá spott, um eg trúði uppá storkin — eg skuldi vera so naiv at trúgva P. M. Dam, sum hevði sent meg.

Tó, tað vóru nógv, sum ikki gjørdu gjøldur úr hesum — tey hómaðu ein vónarneista, tí mangt heimið í Føroyum hevði tað ógviliga smátt.

Í dag er tað ikki ein flokkur, sum ikki 100 pst. tekur undir, tá talan er um at bøta tær sosialu lógirnar. Enn eru vit ikki komin á mál, men nú sæst land fyri stavn. —

Mong onnur dømi kundi verið givin, sum vísa, at vit megu skilja tey ungu og duga at síggja, at nógv positivt er í teirra atfinningum. Vónandi fara vit ikki at gera so greflig mistøk, sum nógv lond, hava gjørt. Ikki fyrr enn tað mangan er vorðið ov seint, eru tey farin at samráðast um problemini, í staðin fyri at roynt at fyribyrgt, áðrenn ov seint varð.

Tey ynskir, sum tey ungu eru samd um, skulu nokk við tíðini verða framd, men hvat ið fer at henda viðvíkjandi teim stóru prinsipiellu spurningunum, sum t. d. skattaspurningum, fordeiling av framleiðslumidlum og kapitalinum, kemur alt at verða avgerandi eftirsum tann partapolitiska støðan fer at verða.

h.